

# Luftin má reinsast

**Løgtingsformaðurin var bersøgin, tá hann helt røðu í Norðurlandahúsinum fríggjadagin í sambandi við, at 10 vóru liðin, síðan løgtingsins umboðsmaður fór til verka. Politiska skipanin má reinsa luftina í grannskoðaramálinum, segði Hergeir Nielsen og fanst at, at skipanin ikki hevur megnað at handfarið lemjandi ákærurnar í hesum máli**

Uni Arge

Fult av fólki var í Skálanum í Norðurlandahúsinum seinnapartin fríggjadagin, tá løgtingsins umboðsmaður, Sólja í Ólavsstovu, hevði boðið til ráðstevnu at taka saman um tey 10 árini, ið løgtingsins umboðsmaður hevur verið virkin. Tríggir høvuðsrøðarar vóru á skránni, Sjúrður Rasmussen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, Johnhard Klettheyggj, leiðandi løgfrøðingur í Heilsumálaráðnum, og Róbert Spano, professari við Háskóla Íslands.

Áðrenn hesir tríggir fingu orðið, beyð Sólja í Ólavsstovu vælkomin, og løgtingsformaðurin, Hergeir Nielsen, segði nøkur orð. Tey umleið 130 fólkini í Skálanum høvdu ivaleyst væntað, at hann fór at bera løgtingsins umboðsmanni nøkur meinaleys góðynski, og tað gjørdi hann lutvíst eisini. Men hann var eisini óvanliga hvassur í síni røðu. Tá hann hevði greitt frá, hvussu løgtingið vanliga handfer frágreiðingarnar frá umboðsmanninum, læt hann hesi orð falla:

"Okkurt málið er kortini, sum misprýðir myndina, ikki av umboðsmanninum, men heldur av teirri vøkkultu samfelagsskipanini, sum ikki enn hevur sæð seg føra fyri at handfara tær lemjandi niðurstøðurnar, ið komu frá tingsins umboðsmanni fyri hálvum ári síðan mótvegis nøkrum av samfelagsins hægstu vøldum. Eitt mál, sum umboðsmaðurin av sínum eintingum hevði tikið upp og kunnað løgtingið um," segði Hergeir Nielsen.

## Skuldu farið frá

Hann helt, at tá stýrisskipanin sigur, at landsstýrismaður hevur rættarliga ábyrgd av málsøki sínum, áttu teir fremstu ábyrgdarhavandi beinanvegin at lagt øll síni politisku størv frá sær til gagns fyri politisku skipanina, tá grannskoðarafrágreiðingin kom. Men soleiðis er tíverri ikki í Føroyum, her lítil orka og minni vilji hevur verið til at staðfesta ábyrgd og taka skjótar avgerðir, so avleiðingarnar ikki gjørdust størri enn neyðugt fyri politisku skipanina og umsitingina, segði løgtingsformaðurin.

"Her hjá okkum vendir alt øvugt. Teir einastu dómarnir, ið feldir eru í miðlunum og enntá av tingsins røðarapalli, hava reinsað teir, ið áttu at havt lagt frá sær. Ein tílík sjálvreinsandi skipan er ókend aðrastaðni," segði Hergeir Nielsen, ið við síni bersøgnu útsøgn gjørdist samrøðuevni í steðginum millum fyrilestrarnar, ikki minst tí hann var maðurin, sum í november í fjør segði við Dimmalætting, at grannskoðarafrágreiðingin fór at verða skrásett hjá tingsins formansskapi sum allar aðrar frágreiðingar.

Tey, sum høvdu lisið frágreiðingina, hildu hetta vera eina merkiliga líkasæla útsøgn um eitt sera álvarsligt mál, men fríggjadagin var tónin ein heilt annar. Hergeir Nielsen fanst eisini at fútanum:

"Ákæruvaldið er eftir trimum og einum hálvum mánað komið eftir, at tað vil onki hava við málið at gera, og politiska skipanin er ikki enn komin á mál við at játta neyðugan pening til at staðfesta ábyrgd og reinsa luftina og soleiðis skapa ein virðiligan arbeisdag aftur í teimum ráðum, ið rakt eru av lemjandi frágreiðingini hjá umboðsmanninum," segði Hergeir Nielsen.

## Óheftur álitisstovnur

Løgtingsformaðurin vísti á, at umboðsmaðurin er álitismaður og tann einasti, ið óheftur er førur fyri at lýsa øll viðurskifti innan almennu umsitingina fyri løggevandi valdinum og almenninginum. Hansara partur liggur ikki eftir í grannskoðaramálinum, tvørturímóti, hann liggur ljósár framman fyri politisku og almennu skipanina annars, helt hann.

"Umboðsmaðurin hevur á sera viðkomandi hátt drigið tjóðldini frá og lýst alment umsitingarligt óskil, meðan politiski myndugleikin ikki enn hevur verið mentur at rudda upp eftir sær. Hetta er ein stórur vandi fyri samfelagsskipan okkara," segði Hergeir Nielsen, áðrenn hann ynskti løgtingsins umboðsmanni og hansara starvsliði til lukku við 10 ára degnum og stóra tøkk fyri dygdargott og mennandi starv fyri føroyska samfelagið.

Eftir hesa røðuna var leiðin løgd hjá hinum fyrilestrarhaldarunum at viðgera samfelagsliga týdningin hjá umboðsmanninum, og sigast má, at teir vóru fullsamdir um tann týdning, ið stovnurin hevur. Sjúrður Rasmussen nevndi m.a., at hann upprunaliga ivaðist í, um nakar føroyingur hevði nóg stórt trúvirði at vera umboðsmaður. Helst var Guttormur í Múli tann einasti, ið hevði neyðugu dygdirnar at røkja tílíkt starv, hevði hann skemtandi tikið til, áðrenn stovnurin nakrantíð kom.

Nú hevði hann tó broytt hugsan og helt, at umboðsmansstovnurin hevur havt stóran týdning fyri tey, sum starvast í umsitingini, serliga sum inspiratión at viðgera mál á nøktandi hátt.